NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Kitty og Pollaba diamantbrúdleyp

Leygardagin 27. desembur kunnu hjúnini, Kitty og Poul Poulsen í Klaksvík, halda diamantbrúdleyp.

Kitty er ættað av Selatrað, dóttir Óla á Trøðni og Elsu, sum var úr Búðunum í Klakksvík. Tey fingu 10 børn, har fleiri vóru tøtt og eisini fingur tey tvinnar tvíburðar. Kitty, sum er tvíburðasystir Jancy, kom sum smágenta til Klaksvíkar og vaks upp í Búðunum hjá Fridu mostir síni og Valdemar í Brekkuni.

Poul Poulsen, Pollaba, er sonur Poul Poulsen, vanliga róptur Pollurin á Dungannum. Kona hansara var Marin Malena í Toft. Tey fingu 4 børn: Lena, Jógvan, Poul, Karla og Ami. Av teimum er Pollaba hin einasti, sum livir eftir.

Pollaba hevur sum so mangur klakksvíkingar havt starv á sjónum alt sítt lív. Hannn byrjaði sum smádrongur at rógva út við pápa sínum, og fór til skips við slupp við snøri, sum dreingir tá.

Í hansara tí á sjónum vóru ikki tær avmarkingar, sum eru í dag. Hann hevur roynt nógvar veiðihættir, snøri, línu, gørn, snellu og trol og roynt fiskileiðirnar við Føroyar, Ísland, Grønland, Norðsjónum, Svalbard, Bjarnoynna og eystur í Hvítahavið.

Hann hevur eisini siglt við íslendskum trolara og enskum ísfiskatrolarum um vetrarnar, eins og norskum línuskipum til saltfisk undir Grønland og arbeitt á landi í Íslandi.

Tey seinastu árini á sjónum, sigldi hann við vaktarskipi við boripallar í Norðsjónum og sum kokkur við føroyskum farmaskipi, áðrenn hann legðist uppá land. Han arbeiddi á flakavirki stutta tíð, áðrenn hann gavst.

Kitty og Pollaba fingu 4 børn, Páll, Elsu, Fridu og Marin Malenu, sum øll eru gift. Tey eiga 16 ommubørn og eisini 16 langommubørn. Kitty var heimagangandi, meðan børnini vóru

små, men tá tey gjørdist størri, vaskaði hon fisk á Norðborg.

Tá børnini vóru vaksin fór hon at arbeiða á flakavirkinum á Kósini og gekk hvønn arbeiðsdag av Bumshamri yvir á Kósina. Hon arbeiddi á Kósavirkinum í 27 ár, har hon tey flestu árini røkti álitisstørv. Hon gavst á Kósini í kreppuárunum, 70 ára gomul.

Kitty og Pollaba komu bæði sum ung til trúgv á Harran, og hava havt sína føstu gongd í Betesda. Kitty hevur í nógv ár eisini hjálpt við summarlegunum, fyrst norðuri við Air og seinni vesturi í Zarepta.

Heilsan og minnið hjá Pollaba eru farin at bila, men enn er vitnisburðurin um Jesus líka greiður, sum tá hann á ungum árum kom til trúgv.

Diamantsbrúdleypsdagur in verður hildin í heimi teirra á Stokksoyravegi, har familja, vinir og kenningar eru vælkomin at støkka inn á gólvið frá kl.15.

Jancy og Jakku diamantbrúdleyp

27. desember kunnu hjúnini, Jancy og Jákup Biskopstø Klaksvík, halda diamantbrúdleyp.

Jancy er ættað av Selatrað, dóttir Elsu og Óla Petersen á Trøðni.

Elsa var ættað úr Búðunum í Klaksvík og giftist Óla av Selatrað; tey fingu 10 børn.

Joen Jacob Biskopstø er ættaður úr Klaksvík, sonur Thominu, ættað av Syðradali á Kalsoynni, og Napoleon Biskopstø í Klaksvík.

Jancy og Jakku eiga 4 børn Óli er giftur við Katrin Purkhús úr Kunoy, tey eiga 3 børn. Elsa er gift við Oliver Joensen úr Klaksvík, tey eiga 4 børn. Jórun er gift við Kristian Andreasen úr Klaksvík, tey eiga 4 børn.

Hallur er giftur við Lisbeth Østerø úr Klaksvík, tey eiga 1 barn. Langommu- og abbabørnini eru 8 í tali.

So at siga alt sítt lív hevur Jakku starvast á sjónum. Sín fyrsta túr fór hann bert 13 ára gamal, og er enn av og á við Jákup B, har hann loysir av sum maskinmeistari.

Jancy hevur fyri tað mesta verið heima, men eitt skifti starvaðist hon í tógvbúðini, Búnanum, og í matvøruhandlinum hjá Kristian Hvidbro.

Tey búgva enn í heimi

sínum á Bumshamri, har tað altíð er serstakliga hugfarsligt at koma á gátt. Øll árini hava tey havt sína trúføstu gongd í samkomuni í Betesda.

Jancy er tvíburðasystir Kitty, sum eisini kann halda diamantbrúdleyp sama dag.

Diamantbrúdleypsdagurin hjá Jancy og Jakku, verður hildin saman við børnunum á Rygsvegi 3 í Klaksvík.

Poula og Magnus Ennistíg gullbrúdleyp

Mánadagin 29 desembur kunnu hjúnini, Poula og Magnus Ennistíg Klaksvík, halda gullbrúdleyp.

Poula er ættað úr Norðdepli, dóttur Oluffu og Jóhannes Jákup Fredriksen. Hon er næstelst av 3 systkjum.

Magnus er ættaður úr Kunoy, sonur Súsonnu og SivertFredriksen, og er næstelstur av 6 systkjum.

Undir krígnum flutti Magnus saman við familjuni til Klaksvíkar at búgva. Torfort at fáa byggitilfar, so húsini í Kunoy blivu tikin niður, og flutt inn til Klaksvíkar, har tey blivu sett upp aftur úti á Bumshamri.

Magnus starvaðist fyrstu tíðina sum krambakallur í handlinum hjá Jens Clæmunti Iskasen í Klaksvíksgarðinum.

Seinni fór hann í læru á Klaksvíkar sleipistøð, har hann starvaðist í mong ár. Eisini starvaðist hann eina tíð á blikksmiðuni hjá Kjølbro. Eini 2 ár var hann við nótabátið, og eisini var han við til at gerða baðar tunlarnar norður um fjall.

Í mong ár starvaðist han

hjá Klaksvíkar kommunu, fyrst við vatnverkið og seinni við Klaksvíkar Havn, til han gavst fyri aldur.

Poula kom ung til Klaksvíkar og fór sum so mangar ungar gentur tá, í húsplass og út at tæna, og eitt skifti starvaðist hon á Hermetik fabrikkini.

Síðani tey giftust í 1953, hevur Poula verið heimarbeiðandi.

Poula og Magnus hava havt eitt fast støði í samkomuni í Betesda, har tey bæði sum ung vóru í kórinum. Magnus hevur í mong ár verið við til at hildið møtir á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

Poula og Magnus eiga 5 børn. Trøndur býr í Havn, Dánjal í Klaksvík, Jákup Oluf í Danmark, Súsanna í Lopra og Jonitha er búsitandi í Havn.

Tey eiga 10 ommu- og abbabørn og 1 langommu- og langabbabarn

Vit ynskja teimum hjártaliga tillukku við degnum.

Gullbrúdleypsdagin halda tey í heimi sínum á Bumshamri í Klaksvík.

Bárður Jákupsson 60 ár

Í dag, Tollaksmessudag 23. desember, fyllir Bárður Jákupsson, listamaður, í Hoyvík 60 ár. Í hesum samandi lat ein málningaframsýning upp 22. november í ár, ið er størsta stakframsýning sum hevur verið í Listaskálanum. Í sambandi við føðingardagin kom eisini bókin "Bárður Jákupsson det vertikale landskab".

Vit hava meira um Bárður Jákupsson í næsta blað.

Aksel Hansen 80 ár

Leygardagin 20. desember fylti ein av okkara fremstu vinnulívsmonnum, Aksel Hansen í Havn, 80 ár. Hendan dagin nýttu vinir og kenningar høvið at heilsa upp á føðingardagsbarnið.

Vit hava meira um Aksel Hansen í næsta blað.

Her eru javnaldrarnir Sverri Trónd Hansen og Aksel Hansen

Mynd: Jan Müller

NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Hans Christian Dam nýggjur stjóri í Fjarhitafelagnum

1. mars 2004 tekur Hans Christian Dam í Havn við sum stjóri í P/F Fjarhitafelagnum, tá núverandi stjórin, Jóannes Hansen, leggur frá sær vegna aldur.

Hans Christian er 44 ára gamal og havnarmaður, sonur Áslu, f. Djurhuus, av Nesi í Vági, og Jóhannes Dam úr Havn, vanliga nevndur Hannis.

Eftir lokna skúlagongd fór hann í læru sum bilmekanikari hjá P/F Vallberg í Havn frá 1977-81. Eftir tað fór hann á maskinmeistaraskúla, har hann tók prógv sum maskinmeistari í 1983.

Frá 1984-88 læs hann til maskinverkfrøðing í Odense, og frá 1989-91 arbeiddi hann sum verkfrøðingur hjá ráðgevandi verkfrøðingafelagnum, Rambøll, í Keypmannahavn, har hann serliga arbeiddi innan fjarhita.

Í 1991 flutti hann heim aftur til Føroya og arbeiddi m.a. sum maskinmeistari hjá SEV, til hann í 1994 fekk starv sum lærari á maskindeldini á Tekniska Skúla í Havn.

Eitt skifti í 1999/2000 arbeiddi hann sum verkfrøðingur hjá Tórshavnar Skipasmiðju.

Eftir tað fekk hann starv sum økisleiðari á Tekniska Skúla. Síðan oktober 2002 hevur hann arbeitt sum verkfrøðingur hjá Fjarhitafelagnum, har hann tekur við sum stjóri 1. mars komandi ár.

Hans Christian er giftur við Beintu, f. Rasmussen, úr Runavík, og tey eiga trý børn: Ásla, Rósing og Jóhanna.

Stjórin í Fjarhitafelagnum hevur um hendi dagligu leiðsluna av felagnum og skal saman við starvsfólkunum skipa fyri nýgerð og rakstri av felagnum umframt dagligu fyrisitingina. Somuleiðis skal stjórin taka lut á nevndarfundum og samstarva við formann felagsins.

P/F Fjarhitafelagið er stovnað av Tórshavanar Kommunu og SEV í 1988. Endamálið við felagnum er at veita fjarhita í Tórshavnar Kommunu og at gagnnýta avlopshitan frá Kommunalu Brennistøðini á Hjalla og elverkinum á Sundi. Í løtuni hevur Fjarhitafelagið 450 brúkarar sum fyri tað mesta eru húsarhald í Hoyvíkshaganum. Nettosølan hjá felagnum er 3,6 milliónir krónur árliga.

Dagurin

23. desember. Tollaksmessa. Dagurin hevur navn eftir íslendska prestinum Tollaki, sum gjørdist biskupur í Skálholti. Hann stóð í hørðum stríði við mætar høvdingar í Íslandi, men eftir deyða hansara í 1193 var tað skjótt, at hann varð mettur mikið halgimenni. Varð nógv virdur um øll Norðurlond tað mesta av miðøldini, men tað er serstakliga í Íslandi og í Føroyum, at tollaksmessa hevur verið hildin. Halgilutir eftir hann eru í múrinum í Kirkjubø. Ikki fyrr enn 14. januar í 1985 lýsti pávin Páll II at verndarhalgimenni Íslands var Tollakur (Sankta Torlacius).

Dagurin verður nú á døgum mest róptur lítli jólaaftan.

Ein søgnin sigur, at í katólskari tíð var bønhús í Gásadali, sum hevði mynd av Tollaki, og hagar komu fólk úr øllum landinum at biðja til hansara. Tollaksmessudagur var annars í Føroyum fastur dagur at stoyta kertu.

Norrønt navn, ið merkir Tórs stríð ella leikur.

Hvussu var jólamaðurin ílatin, tá ið vit vóru børn?

Minningarorð um Herjálv Thomsen, Sandvík

Míni fyrstu minni um Herjálv eru so tætt knýtt at jólahøgtíðini og nýggjárinum, at eg haldi, at minningarorðini um hann eiga at koma nú beint undan jólum. Tí ongi jól í okkara barnadøgum uttan Herjálv sum jólamann og gamlaárskvøld endaði als ikki, um Herjálvur ikki kimaði tað nýggja árið inn.

Tað var eitt sindur ringt at finna fram til, hvussu jólamansbúnin sá út í fimti og -seksti árununum. Eg skrivaði fyrst til Jónu. Hon hevði nógv minni um Herjálv, men hon mintist ikki, hvussu hann var ílatin sum jólamaður:

"Trúgvari sál skalt tú leita leingi eftir. Mær nýttist ongantíð at biðja hann sita barnagenta hjá mær, tá hann arbeiddi her í Havn, hann møtti trúliga upp hvørt kvøld, tá frúan skuldi út, um tað so var sangvenjing, bindiklubb ella okkurt tríðja. So saknurin var stórur, tá hann flutti til Sandvíkar at búgva. Hann var eisini tann fyrsti, sum meldaði seg til silvurbrúdleypið. Eg eri so glað um, at tað untist okkum at hava hann við. Hann hevur verið við til alt, sum vit hava havt líka sjálvskrivaur sum pabba og systkini". So mong vóru orðini, men hon mintist ikki búnan hjá jólamanninum: "-Royn Hildebjartu, hon minnist so væl", kom t-bræv aftur. Eg royndi so Hildebjartu, og jú, tá bar til:

Okkara jólamaður var í koti hjá Hans Paula hjá Ninna, svørtum buksum og reyðari húgvu. Hann hevði ein sekk á bakinum, ein rættiligan sekk, ikki ein svartan ruskposa ella ein fagurtlittan úr BR. Hann var ikki ógvusligur á nakran hátt, lítil og lítillátin eins og Herjálvur sjálvur var í veruliga lívinum.

Sum vit eldust, vistu vit øll, hvør var í kotinum, men jólini vóru ikki rættilig jól, hevði jólamaðurin ikki

verið á jólatrænum í dansistovuni ella í skúlanum.

Soleiðis var eisini á nýggjárinum. Nýggja árið kom ikki á rættan hátt, um vit ikki høvdu verið í kirkjuni við Herjálvi og kimað. Øll børnini í bygdini fóru upp á kirkjuloftið og hugdu at og lýddu á, meðan Herjálvur kimaði. Tey elstu sluppu viðhvørt at halda í bandið eina løtu, men tey yngstu sótu still og hugdu at, viðhvørt var so trongt, at øll sluppu ikki upp á loftið, men so varð bíðað í kirkjuganginum.

Tolni, trúfesti og áhaldni eru tey orðini, sum best lýsa Herjálv. Tolin var hann sum fáur, barnavinur burturav, og trúfesti hansara speglast kanska best aftur í 40 ára arbeiði hansara í kirkjuni. Ikki bara var hann klokkari, hann var eisini tann, sum vit øll heittu á, um vit høvdu ørindi av einum hvørjum slag í kirkjuni.

Mangur útlendingur hevur vitjað kirkjuna í Sandvík saman við Herjálvi. Hann visti alt, sum vert var at vita ikki bara um kirkjuna, men eisini um bygdina. Søgufróðum maður var Herjálvur, og hann minstist væl aftur.

Áhaldni hansara speglaðist serliga í arbeiði hansara á bønum til at grava veitir. Tað liggur eitt stórt verk eftir hann í bønararbeiði, alt við hond sum í dag mangan verður gjørt við maskinu.

Herjálvur var fjórðyngstur av 10 systkjum. Hann var sonur Onnu á Bønhúsfløtu úr Nesi í Hvalba og Tummas Thomsen í Kvilt. Sum ungur arbeiddi Herjálvur á kolinum, og eisini var hann í Íslandi eina tíð. Síðan arbeiddi hann í Havn hjá Finn í Puntabyrgi í eitt áramál, til hann kom aftur til heimbygdina, og tá arbeiddi hann á flakavirkinum í Hvalba.

At Herjálvur var barnavinur hevði hann ikki frá fremmandum. Eg minnst sera væl, hvussu tolin Anna var, tá ið vit komu niðan á støðina at ringja onkustaðni. Tað kundi verða trupult at fáa samband við rætta viðkomandi og ofta skuldi hon sita í tímar, áðrenn tað eydnaðist, men hon ótolnaðist ikki. Ímeðan sótu vit í køkini og bíðaðu - á bonkinum beint innanfyri hurðina.

Herjálvur búði framvegis í barnaheiminum í Kviltini, og løgið er at koma fram við í dag, tí Herjálvur var altíð at síggja uttan fyri húsini, altíð gjørdi hann okkurt, men altíð hevði hann tíð at tosa.

Tað tynnist í bygdini, og saknurin eftir Herjálv merkist í hvørjum húsi, tí hann var ein fastur partur av bygdarmyndini. Leygarkvøldið fyri, at hann fór til gravar gekk eg fram við kirkjuni. Tað var ljós inni, og eg sá høvdið á Herjálvi upp fyri vindeygað. Hann setti sálmanumrini upp. Tað kendist heimligt og gott, og sum tað átti at vera.

Lítið vardi meg tá, at vikuna eftir skuldi hann standa undir børu á sama kirkjugólvi, hann so trúliga tráddi øll hesi mongu árini. Tómligt verður í kirkjuni á jólum.

Við hesum fáu orum lýsi eg frið yvir minninum um Herjálv Thomsen.

Rannveig

Vinum og kenningum verða ynskt eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár. Eisini ein tøkk til øll tykkara, sum mintust 75 ára dagin 1. november.

Kærar heilsanir
Marna og Jákup Joensen, Eiði

Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum ringdu og vitjaðu inn á gólvið føðingardagin og gjørdu mær dagin minnisríkan.

Eisini takki eg fyri gávur, blómur, fjarrit og telefonsamrøður.

Gleðilig jól og gott nýggjár.

Alma Matras, Klaksvík

Tøkk

Stóra tøkk til tykkum øll, sum mintust meg á 85 ára føðingardegnum 8. november.

Ein serstøk tøkk til tykkum, sum komu úr Danmark og til Elim í Søldarfirði, sum gjørdu mær dagin ógloymandi.

Ætt, vinum og kenningum verður ynskt eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

Gunnleyg Poulsen, Skipanes